# Gerðabók hjá Vestmanna bygdarráð
# Bygdarráðsfundur tann 25. februar 2026, kl. 17.00

| | |
|---|---|
| **Møtt á fundi:** | **Sára Jógvansdóttir, Anja Haldansen, Símin Jákup Højsted, Karl A. Olsen, Janus Jensen og Pauli Magnussen** |
| **Skrivari:** | **Sólvit Nolsø** |

Jákup Jóanesarson møtti ikki á fundi.

Umskipan av kommunalu umboðanini í skúlastýrinum var lagt afturat skránni.

Fundur byrjaði kl. 17:00

**Mál 89: Marknaumskipan millum matr. 205ca, Fjalsveg 3, og Fjalsveg.**
Hervør og Bjarni Heinesen hava søkt um at fáa marknalinjuna í eystara horni á matr. 205ca niðan ímóti Fjalsvegi, flutta eitt vet niðan eftir. Biðið er um at flyta eystara horn 81cm niðan eftir.

Umsóknin hevur verið til viðgerðar í teknisku nevnd 16.02.2026. Nevndin mælti bygdarráðnum at ganga umsóknini á møti.

**Við. 89**
Bygdarráðið samtykti einmælt at taka undir við tilmælinum frá teknisku og mæla til eina marknaumskipanin.

**Mál 90: Broyting av bygdarskipan**
Áki Olsen hevur søkt um at fáa bygdarskipanina broytta á matr. 319a, so góðir 1900m2 í eystara enda á matrikklinum verða broyttir frá at vera sethúsøki og til landbúnaðarøki.

Tekniska nevnd viðgjørdi málið á fundi 16. februar og mælti til at ganga umsóknini á møti.

**Viðv. 90**
Bygdarráðið samtykti einmælt at ganga tilmælinum frá teknisku nevnd á møti.

**Mál 91: Umsókn um stuðul til uttanlandaferð hjá Vestmanna sangkóri**
Vestmanna Sangkór hevur søkt um 13.500 krónur til eina ferð til Bornholm frá 21. til 25. mai 2026. Kórið skal luttaka í einari norðurlendskari kórstevnu.

Á skrá eru bæði konsertir, felagssangur og fakligt samskifti við kór úr øðrum Norðurlondum.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og mælti bygdarráðnum til at ganga umsóknini á møti.

**Viðv. 91**
Bygdarráðið samtykti einmælt at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini.

**Mál 92: Umsókn um stuðul frá Bátastevnuni**
Anja Haldansen fór av fundinum, tá mál. 92 var viðgjørt.

Bátastevnan hevur søkt um 50.000 krónur í stuðli til stevnuna 2026.
Seinastu nógvu árini hevur kommunan stuðla tiltakinum við somu upphædd.

Fíggjarnevndin umrøddi máli á fund 19. feb. Nevndin helt tað var rættast, at leikluturin hjá

kommununi í Bátastevnuni í heila tikið átti at umrøðast. Nevndin samtykti at leggja málið til bygdaráðið at taka støðu til.

**Viðv. 92**
Bygdarráðið umrøddi leiklutin hjá kommununi. Stevnan er blivin ógvuliga umfatandi og stór, og leikluturin hjá kommununi er eisini blivin nógv størri. Hinvegin er stevnan eisini ein góður sýnisgluggi fyri kommununa og bygdina.
Niðurstøðan var, at stuðulin skuldi veitast aftur í ár, men at búmerkið hjá kommununi skuldi framganga ógvuliga sjónligt á stevnuni.

Anja Haldansen kom aftur á fund, tá málið var liðugt viðgjørt.

**Mál 93: Tilmæli um takið á skúlanum**
Leiðandi húsavørðurin hjá kommununi hevur gjørt umsitingina varuga við, at 40-ára gamla tekjan á skúlanum er í sera ringum standi. Fleiri lekar eru eisini staðfestir. Lekar eru tettir, men nýggir stinga seg javnan upp.
Hitaskipan riggar eisini illa. Hetta fer illa við skúlanum og ávirkar eisini umstøðurnar hjá starvsfólki og næmingum.
Samlað eru tað eini 760m2 av tekju, ið skulu skiftast. Tíðin strekkir tó ikki til at skifta alla tekjuna í senn, og sannlíkt kann tekjan bert skiftast á einari lon í ár.

Trivnaðarnevndin hevur mælt fíggjarnevndini til at av teimum báðum milliónunum, sum eru settar av til hølir til VÍF, kann ein partur raðfestast til at skifta tekjuna.

Fíggjarnevndin tók undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini og mælti bygdarráðnum til at taka undir við málinum eisini.

Tað er torført at meta um ítøkiliga kostnaðin, men ein fyribils meting sigur, at tað kostar millum 700t og eina millión at skifta takið á einari lon. Við tí er ein rímiliga stór upphædd eftir til forhøllina. Møguliga nóg mikið til at innlokað hana.

**Viðv. 93**
Tað var einmælt samtykt at ganga tilmælinum frá fíggjarnevndini á møti.

**Mál 94: Velja umboðini hjá kommununi í skúlastýrinum av nýggjum**
Jákup Jóanesarson, sum er annar fasti limurin hjá kommununi í skúlastýrinum, hevur spurt um at sleppa úr.
Karl A. Olsen er varlimur hjá Jákup Jóanesarson, men hann hevur frábiðið sær at gerast fastur limur.

**Viðv. 94.**
Skotið var upp, at Pauli Magnussen fór í skúlastýri í staðin fyri Jákup Jóanesarson. Tað var samtykt.

# Gerðabók hjá Vestmanna bygdarráð
# Bygdarráðsfundur tann 25. februar 2026, kl. 17.00

| | |
|---|---|
| **Møtt á fundi:** | **Sára Jógvansdóttir, Anja Haldansen, Símin Jákup Højsted, Karl A. Olsen, Janus Jensen og Pauli Magnussen** |
| **Skrivari:** | **Sólvit Nolsø** |

Pauli Magnussen hevur verið varalimur hjá Anju Haldansen, sum eisini situr í skúlastýrinum. Nýggi varalimurin hjá Anju Haldansen er Símin Jákup Højsted.
Nýggja samansetingin er tann, at Anja Haldansen og Pauli Magnussen eru limir í skúlastýrinum, og varalimir teirra eru ávikavist Símin Jákup Højsted og Karl A. Olsen.

Bókin lisin og fundur lokin kl. 18:10.

| | | |
|---|---|---|
| Sára Jógvansdóttir | Símin Jákup Højsted | Anja Haldansen |
| Karl A. Olsen | Janus Jensen | Pauli Magnussen |